

– *Eg havi tað við at vera ov rótutur og altíð í seinastu løtu, sum als ikki er nakar góður eginleiki. Eisini livi eg í ov stóran mun í eini skipan, sum bert eg kann finna útav, og tað kann gerast frustrerandi fyri medmenniskju míni*

# Tað einasta, eg veit, er, at eg einki veit

**33 ára gamli Jákup Veyhe hevur seinasta tíggjuáraskeiðið sjarmerað seg inn í hjørtu føroyinga og nærmast fingið kultstatus við skemtisendingunum Pipar&Salt. Vit kenna hann øll sum tann komiska entertainaran, men hvør er Jákup Veyhe handan skemtiligu fasaduna, tá ljóskastararnir eru sløktir, filmstólini pakkað saman og hallirnar tómar fyri áskoðarum. Í viðtalu við Sosialin lutar onnur helvtin av Pipar&Salt nakað av tí, sum rørist kring almenna og kenda, men eisini privata og dulda Jákup Veyhe**

SAMRØÐA
*Orð: Heini í Skorini*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Kalli Mohr, mamma Esmar, Skótin í Bø, fornermaða stjórafrúan, Melvin Stardust, vinmaður Símun Tindfjall, Guðrun hjá Esmar, arbeiðarin í pylsuvogninum, Torgrímur, danski ferðamaðurin, Karl Jáge á Kósini… Ja, listin er langur, og vit kenna hann øll. Maðurin, sum við stuttliga, genial og til tíðir flata skemti sínum seinasta áratíggju hevur sjarmerað seg inn í hjørtu føroyinga sum onnur helvtin av duoini Pipar&Salt og Flatt av Flatlondum, umframt at hann eisini hevur verið virkin í kabarettframførslum.

Maðurin er sjálvsagt Jákup Veyhe, sum saman við Sjúrða Skaale veruliga staðfesti sín kultstatus í summar, tá Pipar&Salt aftur var á palli fyri fyrstu ferð í seks ár. Allar framførslurnar vórðu útseldar bæði á bygd og í Norðurlandahúsinum og Høllini á Nabb í Havn. Men hvør er Jákup Veyhe, og hvat býr handan undirhaldandi klovnin, sum fær okkum at flenna, so skjótt hann kemur til sjóndar á palli ella sjónvarpsskíggja?

## Fyrstu sjónvarpssendingarnar í 1992

– Tað heila byrjaði seinast í 80´unum og fyrst í 90´unum. Vit spældu nógvar kabarettir og vóru ikki ókendir í sjangruni. Í 1992 fingu vit áheitan frá Árna Gregersen og Hans Peturi Hansen um at framleiða sjónvarpsskemt. Sendingin kom so at eita Flatt av Flatlondum, tí alt varð tikið upp í Danmark, eru afturlítandi orðini hjá Jákupi Veyhe. Saman við øðrum leikarum fóru hann og Sjúrður Skaale tá undir sínar fyrstu sjónvarpssendingar.

– Hetta var heilt nýtt fyri okkum, og vit máttu líkasum royna okkum fram uttan at vita, hvat vit megnaðu og ikki, og reaktiónirnar í Føroyum vóru eisini ymiskar. Summi dámdu tað, og summi dámdu tað ikki, og tað tyktist at vera nakað undarligt skemt fyri fleiri, sigur Jákup Veyhe. Hann vísir á, at teir lærdu sera nógv hesa tíðina, serliga av Hans Peturi Hansen, sum filmaði og var ein hollur stuðul í gongdini.

> – Tað er upp til hvønn einstakan at meta um okkara skemt og skemt sum heild. Ein setningur sigur, at »beauty is in the eye of the beholder«, og júst henda meginreglan er eisini galdandi fyri skemt.

Í 1993 varð hildið fram at spæla kabarett, og í hesum ári sóu tær í dag legendarisku Pipar&Salt sendingarnar dagsins ljós.

– Í august 1993 gjørdu vit tríggjar Pipar&Salt sendingar. Hans Petur Hansen filmaði, meðan Per Zachariassen redigeraði. Vit skuldu so finna eitt navn til sendingarnar, og orsakað av eini ramsu, sum Sjúrður plagdi at brúka, skeyt Per Zachariassen upp, at tær skuldu eita Pipar&Salt, so orsøkin til navnið var eitt meiri ella minni tilvildarligt uppskot, minnist Jákup Veyhe aftur.

## Herman Jacobsen ein fyrimynd

Spurdur, um tað er fallið Jákupi Veyhe náttúrligt at gerast virkin í undirhaldsgreinini, fær skemtarin eitt heldur álvarsamt og ivasamt andlitsbrá.

– Sosiala umhvørvið hevur havt ein týðandi leiklut í gongdini, tí umstøðurnar kring meg hava lagt upp til, at eg skuldi gerast virkin í sjónleiki og undirhaldi, vísir Jákup á.

Hann sigur, at í ungdómi sínum sá hann sera nógv upp til Herman Jacobsen, sála, sum var sera virkin og nógv frammi, og gjøgnum foreldrini var samband hansara við Herman Jacobsen ein møgulig orsøk til, at Jákup fór at spæla og undirhalda.

– Men hóast umhvørvið hevur havt ein leiklut, hevur hetta verið nakað, eg á ein ella annan hátt havi viljað og valt, leggur Jákup Veyhe hugsunarsamur afturat.

## Venda tingini á høvdið

Pipar&Salt er á mangan hátt samfelagsrevsandi skemt, har ymsar typur og bólkar eru at kenna aftur á ein heldur speiskan hátt. Spurdur, hvar íblástur og hugskot teirra koma frá, vísir Jákup fyrst og fremst á eina ávís a dygd.

– Kunsturin er at eyg-leiða, hvat hendir kring ein og í samfelagnum, og í framleiðingini av skemti okkara merkir tað m.a. nógv fyri meg at vera saman við Sjúrða Skaale. Saman styðja og bjóða vit hvørjum øðrum av, sigur Jákup Veyhe um samstarvsfelaga sín. Hann vísir víðari á, at skemt teirra ikki beinleiðis er samfelagsrevsandi, men heldur er ætlanin at venda tingini á høvdið og vísa viðurskiftini frá einum øðrvísi sjónarhorni.

Spurdur, um tað er lætt at gera skemt í Føroyum, og um føroyska samfelagið í ein mun er eitt sjálvtøkuborð at taka av, sigur Jákup, at tað í øllum førum ikki trýtur við tilfari.

– Óendaliga nógvir bólkar og typur eru at taka av, og í prinsippinum ber til at nýta ein og hvønn í satiru og parodi. Líkamikið hvat vit hava gjørt í Pipar&Salt, hava vit altíð hoyrt minst 10 uppskot um, hvønn og hvat talan var um, sigur Jákup Veyhe.

Hann vísir á, at í sjónvarpsskemti er talan ongantíð um ein ávísan persón, men heldur um skemt, sum umboðar bólkar, typur og rák í samfelagnum.

Hetta kann tykjast mótsigandi fyri mong, tá talan í Pipar&Salt framførslunum í summar júst var um ítøkiligar persónar í fleiri brotum, sum enntá vórðu nevndir við navni.

– Jú, í framførslunum í juli var talan um ávísar einstaklingar, men tað er ein grundleggjandi munur á kabarett á palli og sjónvarpstilfari. Í sjónvarpi kann ein lata skemtið sodna, hugsa um tað og hyggja aftur, meðan ein í live framførslum skal fáa áskoðaran at reagera beinleiðis og skilja skemtið í somu løtu, og tískil gerst tað meiri ítøkiligt og ávíst, sigur Jákup Veyhe.



*– Óendaliga nógvir bólkar og typur eru at taka av, og í prinsippinum ber til at nýta ein og hvønn í satiru og parodi. Líkamikið hvat vit hava gjørt í Pipar&Salt, hava vit altíð hoyrt minst 10 uppskot um, hvønn og hvat talan var um*

> – Tá tað kemur til sjónvarpsskemt, er Pipar&Salt sera einsamalt av tí orsøk, at Sjónvarp Føroya ikki hevur raðfest hetta høgt og ikki latið onnur sleppa framat. Tað er einki minni enn syrgiligt, at evnaríkir sjónleikarar ikki sleppa framat, serliga ungdómur, sum altíð hevur okkurt nýtt at borðreiða við

## Syrgilig raðfesting í SVF

Á henda hátt er stórur munur á live skemti á palli til sjónvarpað skemt, og júst hetta seinna saknar Jákup Veyhe í føroyskum høpi.

– Tá tað kemur til sjónvarpsskemt, er Pipar&Salt sera einsamalt av tí orsøk, at Sjónvarp Føroya ikki hevur raðfest hetta høgt og ikki latið onnur sleppa framat. Tað er einki minni enn syrgiligt, at evnaríkir sjónleikarar ikki sleppa framat, serliga ungdómur, sum altíð hevur okkurt nýtt at borðreiða við, slær Jákup Veyhe fast.

– Í løtuni er einki annað sjónvarpsskemt í Føroyum enn Pipar&Salt, og tað er bæði synd og skomm, sigur hann avgjørdur og bersøgin.

Jákup Veyhe sigur í hesum sambandi eisini, at tað at gerast ov gamal og fáa sínar føstu áskoðarar er ein vandamikil grøv at detta í sum undirhaldari. Linie 3 í Danmark er eitt gott dømi, sum hevur fingið sína føstu áskoðarafjøld, og heldur eftirlýsir Jákup, at yngri og nýggjari kreftir fáa møguleikan.





